## Leitaðu eftir ísbjarnum á Vestfirðum

Eftir at ferðafólk í gjárkvøldið hildu seg hava sæð tvær ísbjarnir, varð farið at leita, og í nátt var løgreglan vís í, at tað ikki eru komnar ísbjarnir á land í Íslandi. Klokkan var umleið níggju í gjárkvøldið, tá ið løgreglan á Ísafirði fekk boð frá ferðalagi, sum var til gongu skamt frá Hvannadalsvatni og millum Hornvík og Hælavík. Boðini vóru, at ferðafólkini hildu seg síggja tvær ísbjarnir í Skálakambi, sum tað verður nevnt. Løgreglan sendi bjargingarskipið Gunnar Friðriksson av Ísafirði og norður á Hornstrandir, og so varð tyrla send at kanna, hvussu tað sá út á staðnum. Leitað varð inntil klokkan hálvgum trý í nátt. Tá varð kanningararbeiðið liðugt, og eingin ísbjørn hevði verið at sæð og heldur einki tekin um, at ísbjarnir eru í økinum. Løgreglan í Vestfirðum sigur við íslendskar fjølmiðlar, at allar sovorðnar fráboðanir verða tiknar í størsta álvara, og at málini harvið verða gjølla kannað.




# Sjálvstýris-flokkurin aftur farin at spøkja í samgonguni



*Tjóðveldið og Javnaðarflokkurin eru bulurin í hesi samgonguni og tað ber ikki til at fremja neyðugar broytingar við Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum. Tí er ongin loysn at fáa annan av teimum upp í samgonguna ístaðin fyri javnaðarflokkin,heldur Tórbjørn Jacobsen*

**Fer Gerhard Lognberg úr samgonguni orsakað av Sandoyar-tunlinum, heldur Tórbjørn Jacobsen avgjørt at ein roynd eigur at verða gjørd at fáa Sjálvstýrisflokkin upp í samgonguna, hóast tað merkir, at landsstýrið skal skipast av nýggjum**

SAMGONGAN
*Áki bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Verða Gerhard Lognberg og kanska eisini Páll á Reynatúgvu alt ov stívrendir í sambandi við undirsjóvar-tunlarnar, kann tað væl hugsast, at samgongan bara setir teir út á eitt síðuspor, har teir onga ávirkan fáa.

- Hendir tað, at teir báðir taka stuðulin til samgonguna aftur so at hon missur meirilutan, eigur ein roynd at verða gjørd at fáa Sjálvstýrisflokkin við upp í samgonguna, heldur Tórbjørn Jacobsen, næstformaður í Tjóðveldinum.

Teir báðir sandoyartingmenninir, Páll á Reynatúgvu og Gerhard Lognberg, hava hótt við at taka stuðulin til samgonguna aftur, fáa verður ikki farið undir at gera Sandoyartunnilin í seinasta lagi fyrst í 2011.

Men hetta vil ongin í annar í samgonguni lova teimum. Einasta lyftið teir fáa, er, at samgongan hevur eitt ærligt ynski um at gera Sandoyartunnilin, men kemur stígur í búskapin, er tað ikki vist, at hann kann verða gjørdur nú.

Tórbjørn Jacobsen væntar ikki, at teir báðir fara at taka stuðulin til samgonguna aftur, so at hon missur meirilutan.

### Royna eftir D

Men skuldi tað hent, er næstformaðurin í Tjóðveldinum til reiðar at bjóða Sjálvstýrisflokkinum upp í samgonguna fyri at varðveita meirilutan á tingi.

- Missur samgongan meirilutan, eiga vit at gera eina roynd at fáa Sjálvstýrisflokkin upp í samgonguna ístaðin fyri, heldur Tórbjørn Jacobsen.

Sjálvstýrisflokkurin hevur fleiri ferðir boðað frá, at hann er ikki sinnaður at vera fastur stuðulsflokkur hjá samgonguni, so antin er hann í andstøðu, ella verður hann beinleiðis við í samgonguni og fær umboð í Landssstýrið?

- So mugu vit taka samráðingar upp um tað, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Og hann ivast ikki í, at ein slík samráðing hevði borið á mál.

- Munurin er so lítil á samgonguskjalinum og tí politikki, sum Sjálvstýrisflokkurin stendur fyri, at tað átti ikki at verið nakar trupulleiki.

Tórbjørn Jacobsen heldur avgjørt at tað hevði verið vert at fingið Sjálvstýrisflokkin uppí, skuldi alternativið verið at samgongan slitnaði.

- Mær dámar hesa samgonguna ótrúliga væl, tí eg haldi, at hetta er einasta samgonga, sum er før fyri at loysa grundleggjandi trupulleikarnar í okkara fiskivinnu, eitt nú við at skipa ein fiskidagabanka.

- Hendan samgongan er før fyri at gera tær umfatandi broytingarnar, sum krevjast í hesum samfelagnum, eitt nú á fiskivinnuøkinum, á eftirlønarøkinum og á skattapolitikkinum

### Tjóðveldi og Javnaðurin eru bulurin

Tórbjørn Jacobsen metir ikki, at tað hevði verið nøkur forðing fyri at framt hesar broytingarnar saman við Sjálvstýrisflokkinum.

Hinvegin heldur hann ikki, at tað er nøkur loysn av umskipa samgonguna heilt og at fáa Fólkaflokkin ella Sambandsflokkin upp í ístaðin fyri Javnaðarflokkin, fyri at sleppa undan hvørkratakinum frá Gerhard Lognberg.

- Eg meti, at tað eru Tjóðveldi og Javnaðarflokkurin, sum eru bulurin í hesi samgonguni, tí hinir báðir stóru flokkarnir hava víst, tað ber ikki til at fremja neyðugu broytingarnar samanvið teimum, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Javnaðarflokkurin og Tjóðveldið eru rættiliga samdir flokkar á at kalla øllum økjum uttan tí tjóðskaparliga.

- Men fáa vit framt neyðugu broytingarnar í samfelagnum, verður tað eitt so sterkur, búskaparligur grundvøllur undir einum sjálvberandi búskapi, at tað verður munandi lættari hjá veljaranum at taka støðu til tann tjóðskaparliga spurningin, tí tá kann krossurin setast, uttan at stúra fyri fíggjarligu avleiðingunum.

# Hóttu starvsfólk við lívinum

**Ein arbeiðsgevari í Eysturoy og hjálparmaður hansara, eru fongslaðir fyri at hava hótt tvey starvsfólk við lívinum**

HÓTTANIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú um vikuskiftið tók løgreglan í Eysturoy ein arbeiðsgevara fyri at hava hótt tvey starvsfólk hjá sær við lívinum.

Samstundis varð ein hjálparmaður hjá arbeiðsgevaranum eisini tikin fyri tað sama.

Báðir menninir vórðu fyri í Føroya Rætti um vikuskiftið, har teir vórðu skuldsettir fyri at hava hótt tvey útlendsk starvsfólk við lívinum.

Teir høvdu eisini tikið passini frá teimum útlendsku starvsfólkunum og sostatt forða teimum í at sleppa av aftur landinum.

Men tey útlendsku starvsfólkini meldaðu málið til løgregluna, sum síðani handtók teir báðar menninar.

Rætturin gjørdi av at fongsla báðar menninar íme̋ðan løgreglan kannar málið.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni sigur, at forboð er fyri at nevna nøvn í málinum fyri ikki at órógva kanningararbeiðið og av tí sama var rættarmálið eisini fyri læstum hurðum.

Sostatt er tað ikki nógv, sum hann kann siga um málið.

Teir báðir menninir noktaðu seg sekar.